Fra: Fíggjarmálaráðið
Sendt: fríggjadagur, 14. november 2025 15:47
Til: Journalin hjá LMS
Cc: Bjarni Askham Bjarnason; Tórir Michelsen
Emne: Uppskot til løgtingslóg um Suðuroyartunnilin við tilhoyrandi tunnilskervum og vegakervum (fyrireiking, prosjektering og útboð).
Vedhæftede filer: Fylgiskjal 49 - Hoyringarskriv frá Fíggj__ armálaráðnum.pdf

Góðan dagin

Í sambandi við uppskot til løgtingslóg um Suðuroyartunnilin við tilhoyrandi tunnilskervum og vegakervum (fyrireiking, prosjektering og útboð).

Fíggjarmálaráðið vísir til ummælisskriv frá Fíggjarmálaráðnum í sambandi við líknandi lógaruppskot í løgtingsmáli nr. 072/2024, sum er hjálagt.

Fíggjarmálaráðið ynskir at nágreina aftrat ummælinum í sambandi við løgtingsmál nr. 72/2024, at verkætlanin síðani er vaksin og dýrkað.

Fíggjarmálaráið metir, at hægri kostnaðurin av verkætlanini bara styrkir um tilmælini frá Fíggjarmálaráðnum, og at hetta fer at gera tað neyðugt, at uppaftur størri upphædd skal gjaldast áðrenn og í byggitíðini.

Vinaliga / Kind regards

FÍGGJARMÁLARÁÐIÐ
Ministry of Finance

Fíggjarmálaráðið
Ministry of Finance
Tinganes
FO-100 Tórshavn
Faroe Islands

Office: +298 352020
www.fmr.fo

LM-066/2025
LM-072/2024

FÍGGJARMÁLARÁÐIÐ
Ministry of Finance

Løgmansskrivstovan
Postbox 64
Tinganes
110 Tórshavn

Tórshavn, tann: 13. desember 2024
J. nr.: 24/26243-3
Viðgjørt: ASL, EC, TM, DH, BAB

Fíggjarmálaráðið hevur fingið uppskot til løgtingslóg um Suðuroyartunnilin við tilhoyrandi tunnilskervum og vegakervum til viðmerkingar. Lógaruppskotið gevur P/F Suðuroyartunnil heimild til at fyrireika, prosjektera og bjóða verkætlanina Suðuroyartunnilin við tilhoyrandi tunnilskervum og vegakervum út.

Fíggjarmálaráðið hevur hesar viðmerkingar til uppskotið.

1. Fíggjarmálaráðið tekur undir við, at ein heimildar- og verklagslóg verður gjørd til at fyrireika, projektera og bjóða verkætlanina Suðuroyartunnilin út, men mælir frá, at verkætlanin verður boðin út, áðrenn búskaparligu fyritreytirnar, lýstar í 4. petti, eru loknar.

2. Tað er skilagott at seta pening av til at lýsa verkætlanina betri, undir hesum at projektera, fyri at fáa gjørt eina neyvari kostnaðarmeting av einari so týðandi og dýrari verkætlan. Í samsvari við galdandi skipan verður mælt frá at geva felagnum heimild til at gera arbeiðsvegir og portalar, áðrenn verkætlanin er løgd fyri og samtykt av Løgtinginum.

3. Avleiddar landsvegaverkætlanir eiga at verða koyrdar í sjálvstøðuga verklagslóg í samsvari við galdandi skipan. Tað inniber, at tær verkætlanirnar verða fyrireikaðar, projekteraðar og bodnar út, áðrenn verklagslóg verður løgd fyri Løgtingið.

4. Tað er avgerandi, at búskaparligu fyritreytirnar eru til staðar, áðrenn endalig heimildar- og verklagslóg um at byggja Suðurtunnilin verður løgd fyri Løgtingið. Tær fyritreytirnar eru serliga:
   a. At neyðug átøk fyri at tryggja haldførið hjá landinum uppá stutt- og langsikt eru samtykt av Løgtinginum.
   b. At ongin veðhaldsbinding er mótvegis P/F Eystur- og Sandoyartunlum longur, soleiðis at skuldin hjá felagnum ikki verður roknað sum partur av skuldini hjá landinum.
   c. At landið í nøkur ár hevur skotið neyðugan pening inn í felagið; størri eginfíggingin er, tess minni verður lántøkan og váðin.

5. Tørvur er á at kanna, hvussu verandi farleið til Suðuroyar kann rekast skynsamari og effektivari, undir hesum at tillaga prísbygnað og rakstur og at skilja farmaflutning og ferðafólkaflutning at, serliga um verkætlanin við Suðuroyartunlinum kemur í drag. Fíggjarmálaráðið hevur eisini áður víst á, at roknaði miðal kostnaðurin av farleiðini í uppskotinum eigur at vera uml. 130 mió.kr.

6. Tað eru nógvar aðrar stórar almennar løgur, sum eru neyðugar at gera næstu 15 árini. Víst verður til fylgiskjal A til Búskaparfrágreiðing I fyri 2024. Verður farið undir hesa verkætlanina, verður væl minni fíggjarligt rásarúm til aðrar neyðugar almennar løgur.

Tinganes, 13. desembur 2024

Bjarni Askham Bjarnason	Atli Suni Leo
Aðalstjóri	Ráðgevi